gult16 cyan16 magenta16 svart16



HB–VB 4–1 (3–0)

# Úrlætnir meistarar

**HB lagt ongan iva vera um, hvat lið skuldi víðari í hálvfinaluna, og við størri neyvleika kundi væl verið, at sigurin í tølum hevði verið enn størri**

LØGMANSSTEYP
*Jákup Mørk*

Tað líktist einum spennandi dysti, tá HB og VB sunudagin skuldu gera av, hvør teirra skuldi sleppa at halda fram í steypakappingini. Talan var jú um tey bæði fremstu føroysku liðini í fjør, og hóast HB tá gav VB ein ordiligan umgang í steypakappingini, so var talan um sera javnar dystir í landskappingini millum liðini.

Tá dysturin var liðugur, sýndi máltalvan ein 4-1 sigur til HB, og tað mundi neyvan vera nakar áskoðari, sum ivaðist i, at at dysturin hevði funnið rætta vinnaran. VB varð snøgt sagt úrlætið, og skuldi nakað verið øðrvísi í dystinum, skuldi tað helst verið soleiðis, at heimaliðið fekk fleiri enn tey fýra málini.

## Byrjaði javnt

Fyrstu løtuna av dystinum var annars ikki líkt til, at talan skuldi gerast um nakran serliga stóran mun ímillum liðini. VB tóktist í útgangsstøðnum at leggja sera varisliga út. Krzyztof Popczynski hevði flutt seg sjálvan oaman á miðvøllin, har hann helst skuldi hjálpa til at skapa meira tyngd í, meðan Robert Cieslewicz varð latin einsamallur á toppinum.

Hóast vágbingar soleiðis tóktust at vilja binda um heilan fingur, so var tó sjónligt, at teir kortini royndu at skapa nakað frameftir. Tá bólturin varð vunnin, royndu teir við skjótum samanspæli at koma sær niðan móti HB brotsteiginum, og hóast tað ongantíð gjørdist heilt vandamikið, so tóktist greitt, at HB-verjan skuldi ansa væl eftir, soleiðis at eingi óneyðug mistøk vórðu framd.

At VB-miðvøllurin var væl mannaður, viðførdi eisini, at HB ikki hevði so lætt við at spæla seg fram til veruligar málmøguleikar.

## Alt fall saman

Sostatt var spæliætlanin hjá VB í stóran mun bygd á møguleikan fyri kontraálopum, og hetta mundi eisini vera orsøkin til, at alt brádliga gekk galið hjá gestunum. Eftir at HB skoraði tvey mál innan heilt stutta tíð í fyrra hálvleiki, broyttust fortreytirnar hjá gestunum at spæla, og teir megnaðu ongan tíð at seta nakað trýst niðan móti HB málinum.

Teir royndu at flyta liðið nakað niðaneftir, men einasta avleiðingin av hesum var, at verjuparturin gjørdist sera opin, og satt at siga skulu teir prísa sær lukkuligt fyri, at neyvleikin í HB royndunum ikki var nóg stórur. Bjarni Johansen hevði onkra frálíka bjarging, og stólparnir í Gundadali mundu vera hampuliga illa viðtiknir, tá gestirnir loksins fóru heim.

## Kenna sítt pláss

Sýndi VB veikleikar í avriki sínum, so kann ikki sigast annað enn, at HB sýndi stóra styrki, eins og hegni til at gera sær dælt av veikleikunum hjá mótstøðumonnunum.

Sjálvsagt er leikaratilfarið á liðnum gott. Hetta er jú ein av fyrstu fortreytunum fyri at standa seg í fremstu røð, men størsta styrkin hjá HB er ivaleyst, at hvør einstakur leikari kennir sína uppgávu á liðnum. Tá farið verður á vøllin, verða teir 90 minuttirnir avgreiddir uttan stórvegis hóvasták

Burtur sæð frá teimum avrikum, sum gøtumenn stóðu fyri miðskeiðis í 90'unum, man tað vera sera sjáldan, at eitt lið í somikið stóran mun hevur eitt fast konsept at spåæla eftir. Veikleikin í hesum er kanska, at tað kann verða torført at umstilla seg, um alt ikki gongur eftir vild, men hinvegin er sera sjáldan, at fjáltur kemur á spælið.

Harumframt tykist HB eisini nógv styrkt av Una Arge, sum nú aftur er í barndómsfelagnum. Við honum hevur liðið fingið ein leikara, sum kann avgera teir dystir, sum kunnu fella báðar vegir, og hóast úrtøkan væl kundi verið betri sunnudagin, so er einki at ivast í, at Arge maðurin er ein av avgjørdu favorittunum til gylta skógvin hetta kappingarárið.



*Einki er at ivast í, at hetta í ár verður ein vanlig sjón hjá HB-viðhaldsfólkunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Málini

Sums sagt, so varð dysturin at kalla avgjørdur innan ein minutt, tá okkurt um eitt korter var farið av fyrra hálvleiki. Fyrst slapp Andrew ígjøgnum vinstru megin, og tá bólturin gjørdist ov høgur til Una Arge, stóð Allan Mørkøre púra leysur við handaru stong, og eftir at hava tamt, kundi hann við vinstra beini langa bóltin í meskarnar.

Næsta málið átti Jón Rói Jacobsen við húð og hár. Ein slalomtúrurfrá unga miðverjanum ígjøgnum VB miðvøllin endaði í fyrsta umfari við at Bjarni hálvbjargaði rondini frá Una Arge, og so kundi Andrew seta bóltin í tóma málið. Nakað seinni gjørdist tað 3-0, tá Uni Arge sera hegnisliga stútaði innlegg úr høgru í málið, og leingi sá eisini út til, at hetta skuldi gerast endaliga støðan.

Seint í seinna hálvleiki økti Hallur Danielsen so, tá hann gjørdist leysur í brotsteiginum, og tá VB so loksins kom á talvuna, kundi vakra málið frá Jón Paula Olsen ikki nýtast til stórvegis annað enn eina fátæka troyst.

**HB-VB 4-1 (3-0)**
1-0: Allan Mørkøre
2-0: Andrew av Fløtum
3-0: Uni Arge
4-0: Hallur Danielsen
4-1: Jón Pauli Olsen

Dómari: Súni Johansen
HB: Bárður Johannesesen – Vagnur M. Moretensen, Jóhannis Joensen, Jón Rói Jacobsen, Janus M. Joensen – Allan Mørkøre, Rúni Nolsøe, Røgvi Jacobsen, Hallur Danlielsen, Uni Arge, Andrew av Fløtum
VB: Bjarni Johansen – Predrag Zivkovic, Eyðun Jaocbsen, Magni Jacobsen – Palli Augustinnussen, Michael í Lágabø, Jón Gærdbo, Dan Djurhuus, Marek Wiersbicki, Krzyztof Popczynski – Robert Cieslewicz

# Nýggjur fjeppari

**Todi Jónsson hevur fingið ein nýggjan fjeppara, og hesin er eingin annar enn Michael Laudrup**

ÚTISETAR
*Jákup Mørk*

Í danska Ekstra-blaðnum mánadagin er ein grein, har blaðið hevur biðið hjálparvenjaran hjá danska landsliðnum, Michael Laudrup, tikið eitt danskt útisetalið út. Hetta er so eitt lið, sum verður mannað av útlendsku leikarunum í superliguni.

## Todi á miðjuni

Á vinstra miðvallarplássi hevur Laudrup sett Toda Jónsson, og ikki kann sigast annað enn, at tað eru vøkur orð, sum Todi fær við sær frá fyrrverandi stórspælaranum.

– Í vinstru síðu er Todi Jónsson, sum umframt at vera ein góður bóltspælari og sera skjótur eisini hevur góðan fysik í ein móti einum støðum. Hann er ein ógvuliga fullkomin spælari.

Tá blaðið so spyr Michael Laudrup, um Todi hevði verið eitt evni til danska landsliðið, um hann hevði loyvi at spæla á hesum, svarar hjálparvenjarin, at tað hevði hann avgjørt verið.

– Heilt víst. Tað vildi ein og hvør verið, sum kann skapa so nógv sjálvur. Hann hevði heilt víst kunna spælt á fleiri landsliðum, sigur Michael Laudrup um føroyska álopsessið, sum altso er miðvallari í Danmark.

# Úttøkukapping í triathlon

**Fyri fyrstu ferð verður skipað fyri úttøkukapping í triathlon til Oyggjaleikirnar á Isle of Man í juli.**

TRIATHLON
*Tíðindaskriv*

Leygardagin 28/4 kl. 1800, skipar Føroya Triathlon Felag fyri úttøkukapping til Oggjaleikirnar í juli.

Byrjað verður við 1500 m svimjing í Svimjihøllini í Havn. Tá liðugt er at svimja, skal súkklast 40 km, frá Svimjihøllini til Kaldbaks, inn í Kaldbaksbotn og út aftur til Kaldbaks, síðani til Havnar til rundkoyringina á Ringvegnum, gjøgnum hana og oman til Skógrøkt Landssins, har farið verður at renna seinasta teinin, ið er 10 km. Runnið verður tvær ferðir eftir Hvítanesvegnum, Ringvegnum og fram við Strond til Sparikassan og niðan aftur til Skógrøkt Landsins, har málið er.

Leiðin har súkklað og runnið verður er nýggj, og løgd soleiðis at nærum slætt er, hetta tí at á Isle of Man er triathlonøkið púra slætt, og helst skuldi úttøkukappingin víst nøkulunda hvar føroyingar liggja í altjóða høpi. Svimjingin brýtur tó frá, við tað, at á Oyggjaleikunum verður svomið á einum vatni, og loyvt er íðkarunum at elta hvønn annan, og skuldu okkara triathlonfólk havt fyrimun av hesum. Í súkklingini er hinvegin ikki loyvt at elta kappingarneytar, og verður ein yvirhálaður, so skal ein skjótast møgligt fara afturum og út til síðuna, so fyrimunur ikki verður av at liggja í læ. Ætlaða vinnaratíðin verður beint omanfyri 2 tímar, treytað av at veðrið er til vildar.

Fýra menn og ein kvinna sleppa við, so tað verða tey ið skjótast eru, ið eiga plássini.

Føroyingar hava ongantíð verið við í hesi ítróttagrein í Oyggjaleikahøpi fyrr, so spenningurin er stórur, og hava folk vant dúgliga, bæði her heima og í Danmark.

Beint aftaná Oyggjaleikirnar á Gotlandi í 1999, var farið at arbeiða við at stovnseta eitt felag, ið sum limur í ÍSF kundi senda íðkarar til kappingar uttan lands, og til m.a. Oyggjaleikirnar.

3. jan. í ár var Føroya Triathlon Felag so endaliga góðtikið sum fult gildugur limur í ÍSF, undir Deildarsambandinum fyri Súkkling og Frælsa ítrótt.

Tey ið hava hug at vera við skulu siga frá hjá formanninum Evald Ras-mussen 316552 ella skrivaranum Gunnar Dahl Olsen tel 319030, og eru tað so nøkur, ið bara vilja vita hvat hetta er fyri nakað, so eru tey eisini hjartaliga vælkomin.

gult17 cyan17 magenta17 svart17



# Menning, menning menning

**Siðani fyrstu Prix Føroyar kappingina í 1995, er nógv hent. Ein av føroysku plátu útgávunum í áttatiárunum sang so rámandi um menning, og tað kann staðfestast, at innan tónleik og føroyskt prix er menning hend á øllum økjum. Innan tónleik, tøkni og sum heild innan professionalismu**

PRIX FØROYAR
*Dagfinn Olsen*

Tónleikakappingin Prix Føroyar er annaðhvørt ár. Og síðan byrjan í 1995, er nógv hent. Finalan í ár var á einum tónleikaligum støði, ið ikki er hoyrt áður. At døma, var veruliga ein uppgáva fyri hægsta rættarvaldið, tí har mundu marginalarnir vera smáir.

Eisini var ljóðið sera væ umsitið. Menning! Og hetta hevur verið gongdin. Øll lið í prix-kervinum eru vaksin við uppgávuni, sum árini eru gingin. Eygu og oyru fáa nú góðsku í breiðastu merking. Hvørt talan so er um live-uppliving, ella útella sjónvarp. Norðurlandahúsið, ÚF, SvF og FUT hava sett í gongd eina gongd, ið veksur við ferð og hetta er positiv gongd. So positiv, at tað nú, uttan himpr, ber til at bjóða útlendskum gestum at døma og annars velja, hvørt her er okkurt, ið teir kunnu gera nýtslu av, til fyrimuns fyri allar partar.

Í ár hendi so eisini tað gleðiliga, at ikki bert ein vinnari var, sum so, hóast dómararnir valdu nummar eitt, tvey og trý. Tveir bólkar fingu møguleika at leika á donskum festivalum, og hesir taldust ikki alneyðugt millum vinnandi bólkarnar í dómaraatkvøðum. Úrslitið gjørdist jú eisini, at eini bólkurin, ið slap at leika í Danmark, ikki taldist millum 3 teir fremstu í dómaraatkvøðum, nevniliga Týr, ið fara á Jellingfestival. Donsku festivalumboðini tóku avgerð um, hvørjar bólkar teimum tørvaði, áðrenn endaliga úrslitið av dómaraatkvøðum varð kunngjørt.

Fremsti bólkurin, Clickhaze, fekk innbjóðing til Nibefestival, umframt at fáa høvuðsvinningin frá Mentamálastýrinum, nevniliga eina viku við upptøku í Studio 1 í Lundgaard Studio.

Innbjóðing er eisini komin úr Ólavsvík í Íslandi, um at fáa ein finalubólk til føroysku dagarnar har.

Eini 15 útlendskir eygleiðarar og dómarar luttóku hesaferð. Og samanumtikið má sigast, at fyrireikarar, saman við danska ljóðmanninum, Claus Pedersen, framdu eitt framúr avrik, eina góða og flotta produktión. Svf hevði m.a. fingið herluf Sørensen heim at produserað, hann starvast dagliga í DR, so allar góðar krefir hava verið lagdar í og eitt sindur afturat.

Og millum útlendsku gestirnar, ið ikki allir kendu til føroysk viðurskifti, hvørki so ella so, var semja um, at hetta var í allar mátar eitt virðiligt og flott tiltak, flott framleiðsla.

# Føroyingum tørvar tónleikaumboðan í Danmark

**Navnframasti útlendski gesturin hesaferð, mundi vera danski undirhaldsveteranurin Hans Otta Bisgaard. Hann hevur í meira einn 30 ár starvast hjá Danmarks Radio innan tónleik og undirhald og kann sammetast við Mylius. Hann metir, at danir kenna púrt einki til føroyskan tónleik, eins lítið og hann ger tað sjálvur, meðan teir kenna grønlendskan tónleik munandi betri**

PRIX FØROYAR
*Dagfinn Olsen*

Hans Otta Bisgaard er veteranur á Danmarks Radio, men hann starvast nú hjá privatfyritøkuni Metronome. Tó ger hann enn ymiskt fyri DR, og sum innboðin gestur til Prix Føroyar heaferð, var hann eisini í ørindum fyri DR, ið hann skuldi gera okkurt innslag fyri.

Hans Otto Bisgaard og konan vitjaðu í samband við Prix Føroyar 2001 Føroyar fyri fyrstu ferð. Og bergtikin eru tey av føroysku náttúruni og tey hava havt spennandi ferð, hóast stuttan støðg.

- Vit søgdu sjálvsagt ja til innbjóðingina. Og tað hevur verið eitt upplivilsi, hóast vit bert hava sæð ein lítlan part av Føroyum, sigur Hans Otto, ið m.a. hevur vitjað í Kirkjubø á ferðini.

- Vit hava fingið okkara fyrsta tíma í ”færøundervisning” , skemtar Hans Otto væl nøgdur, eftir prix finaluna og eftir at hava fingið eina samrøðu við Clickhaze.

## Kennir ikki føroyskan tónleik

Hans Otto, ið jú ikki hevur vitjað Føroyar áður, kennir lítið til viðurskiftini og hevur ikki frammanundan ferðini innlit í føroyskt tónleikalív.

- Neyðugt er avgjørt við føroyskari tónleikaumboðan í Danmark og aðrastaðir. Danir kenna t.d. væl grønlendskan tónleik og øll kenna Rasnus Lyberth, um teimum so dámar hansara tónleik, ella ikki. Tey skilja ikki eitt orð, men tey kenna hann, og tað hevur týdning, staðfestir Hans Otto Bisgaard.

Hans Otto fegnast um vinnandi bólkin, Clickhaze, og at júst hesin vann. Aftur nevnir hann Lyberth úr Grønlandi og samanber.

- Clickhaze hevði okkurt serstakt, originalt. Tey tora at vera tað tey nú einaferð eru, sigur Hans Otto Bisgaard.

Hans Otto hevur sagt á Føroyaferðini, at hann vónaði at hoyra hav og hval og annað serføroyskt í tónleikinum. Gekk ynskið út, fann hann nakað av hesum í tónleikinum?

- Ja, sigur Hans Otto, og drálar, okkurt var, men hevði tað ikki verið fantastiskt, um ein kundi lagt alt hetta í ein tekst, ein sang, tá hevði veruliga nakað serstakt verið.



*Ein av kendastu útvarps- og sjónvarpsmonnum í Danmark síðstu 30 árini, Hans Otto Bisgaard, var gestur til Prix Føroyar finaluna 2001 og hann rósar ferðini*

*Mynd Jens Kristian vang*

- Danmark er eisini eitt lítið land, vit kenna eisini til minnilutakenslu, hetta, at vit duga og nytta einki. Men møguleikin fyri at gerast stjørna er hin sami, hvørt ein verður aldur upp í Danmark, Grønlandi, Svøríki ella í Føroyum. Kanka er hann bara betri, um ein býr í Føroyum, sigur Hans Otto, og hevur hugsað meira um upprunaliga spurningin, tí brádliga sigur hann.

- Jú eg fann nokk nakað av tí, eg leitaði eftir, í tónleikinum hjá Clickhaze, staðfestir Hans Otto hugsunnarsamur.

- Men áskoðarafjøldin var eisini fantastisk, tey bakkaðu allar bólkarnar upp. Tey vóru góður stuðul, metir Hans Otto Bisgaard, ið veruliga er hugtikin av framúr flotta tiltakinum og produktiónini.

- Eisini sjónvarpsframleiðslan var væl framleidd, sigur ein væl nøgdur Hans Otto Bisgaard.

Ùtsendi tíðindamaðurin hevur frá øðrum útlendskum gesti fingið orðini, at kanska var nakað av Bjørk í Eivør, frontkvinnuni í Clickhaze, og má tí koma við einum síðsta spurningi til skundmikla Bisgaard. Er nakað í hesum?

- Eivør er ung enn og finnur óivað seg sjálva. Kanska er nakað av Bjørk í Eivør, men har er sanniliga eisini nakað av Eivør í Eivør! Kanska hon hevur íblástur frá Bjørk. Men Bjørk hevði jú eisini sínar fyrimyndir, sigur Hans Otto og reksar upp nakrar av heimsins fremstu songkvinnum.

- Og skal ein hava eina fyrimynd, so er Bjørk ikki tann vánaligasta, staðfestir Hans Otto Bisgaard.

# Heim at skriva betri løg

**Einasti útlendski gesturin hesaferð, ið áður hevur vitjað Prix Føroyar, er Jens Ove Friis. Hann kennir eitt sindur til føroyskan tónleik og hevur áður eftirlýst originalitetinum. Her er ein glotti, metir hann, men á melodisíðuni haltar, kanska meira nú, enn fyri tveimum árum síðani**

PRIX FØROYAR

*Dagfinn Olsen*

Jens Ove Friis, stjóri í Art-Music og CMC-Records, vitjar javnan í Føroyum. Hann hevur føroyska konu og var eisini við til Prix fyri tveimum árum síðani. Hann er eittnú ein av høvuðsmonnunum aftanfyri donsku tvíræddaðu sólstrálusøguna Creamy, ið jú er hálv føroysk.

Jens Ove Friis hevði ikki vinnandi bólkin, Clickhaze, sum sín nummar eitt, men heldur tað vera í lagi og uppiborið, at tey vunnu.

- Kanska í so nógv av Bjørk var í. Kendist eisini eitt sindur ”uforløst”, men tey vunnu og tað er heilt okey, metir Jens Ove Friis.

Um hann skal sammeta við Prix Føroyar fyri tveimum árum síðani, so er hann ikki bara positivur.

- Eg havi fyrr eftirlýst tí serstaka, originaliteti. Tað er við at vera har. Nøkur eru við at finna seg sjálvi. Hesaferð var ikki so nógv eftirgerð, kopi, sum seinast og úttrykkini eru betri, metir Jens Ove Friis.

- Men viðvíkjandi løgunum er søgan ein onnur. Melodisíðan haltar.

- Tey mugu heim at skriva betri løg, meira melodiøst.

Sigur tú hetta, tí nógv av tónleikinum er harður rockur?

- Nei, als ikki! Rockur er í lagið, men eisini her krevst eitt gott lag, tað krevst, at grundin er OK. Eg vil siga, at viðvíkjandi løgunum, og at tey fanga, so er støðan ikki batnað, kanska heldur hinvegin, metir Jens Ove Friis.

Hann hevur lurtað nógv eftir føroyskum tónleiki og metir, at okkurt er við at henda, við at vera har, sum tikið verður til.

- Týr er við at vera har, sigur Jens Ove Friis, sum tó ikki er heilt til reiðar enn at bjóða teimum plátusáttmála, tí tá er talan um eina ætlan í milliónflokkinum.

- Týr hava røturnar við og tað virkar í øllum førum uppá meg! Eg tori ikki rættiliga enn at lova teimum sáttmála, um eg enn fegin vildi. Eg kundi hugsað mær at roynt, um slíkt eisini hevur kommersiella megi, sigur Jens Ove Friis í stuttari viðmerking.



*Jens Ove Friis, maðurin aftanfyri bólkar sum Creamy, heldur, at føroyskir bólkar eiga at seta seg niður og skriva betri løg, ið fanga betri, so tónleikagrundarlagið gerst betri*

*Mynd: D.Olsen*